# Skeið á Húsarhaldsskúla Føroya á vári 2001

***Lær at seyma vest til tann føroyska búnan: (Vikuskiftisskeið)***
Lær at seyma vest til føroyska búnan.
Vikuskiftisskeið 16.–17. mars og 23.–24. mars
Skeiðið byrjar fríggjakvøld kl. 19:00–22:00 og leygardag frá kl. 9:30–16:30
Undirvísari: Gunhild W. Arge
Kostnaður fyri skeiðið v/ mati er 600,- kr. Tilfar er ikki íroknað.

***Lær at seyma buksur til tann føroyska búnan: (Vikuskiftisskeið)***
Lær at seyma buksur til føroyska mannfólkabúnan
Vikuskiftisskeið 27.–28. apríl og 4.–5. mai.
Skeiðið byrjar fríggjakvøld kl. 19:00–22:00 og leygardag frá kl. 9:30–16:30
Undirvísari: Gunhild W. Arge.
Kostnaður fyri skeiðið v/ mati er 600,- kr. Tilfar er ikki íroknað.

***Neytadukka (vikuskiftisskeið)***
Frálæra verður givin í at gera klæðir til eina neytadukku. Binda bundnaturriklæði og troyggju, seyma skjúrt, fyriklæði og turriklæði. Tú lærir eisini at bregda, virka og tólvtra.
Vikuskiftisskeið 27.–28. apríl og 4.–5. mai.
Skeiðið byrjar fríggjakvøld kl. 19:00–22:00 og leygardag frá kl. 9:30–16:30
Undirvísari: Jutta Heinesen og Paulina Eliasen.
Kostnaður fyri skeiðið v/ mati er 600,- kr. Tilfar er ikki íroknað.

***Brodering til føroysk klæðir og annað: (vikuskeið)***
Frálæra verður givin í at tekna mynstur til fyriklæði og turriklæði til føroysk klæðir úr føroysku floraini, og í brodering og montering. Møguleiki er eisini at brodera og at tekna mynstur til ymiskt annað.
Skeiðið er frá 30. apríl til 4. mai. Undirvíst verður frá kl. 9:00–16:00
Skeiðið endar fríggjadagin kl. 15:00
Undirvísari: Jutta Hansen
Kostnaður fyri skeiðið v/ mati er 1000,- kr. Tilfar er ikki íroknað.

***Lær at seyma kot til føroyska búnan: (vikuskeið)***
Frálæra verður givin í tilskering og seyming.
Skeiðið er frá 30. apríl til 4. mai. Undirvíst verður frá kl. 9:00 til 16:00
Fríggjadagin endar skeiðið kl. 13:00
Undirvísari: Gunhild W. Arge
Kostnaður fyri skeiðið v/ mati er 1000,- kr. Tilfar er ikki íroknað.

***Heilsugóður matur/ymiskt handarbeiði: (vikuskeið)***
Frálæra verður givin í heilsugóðum mati, ymiskum handarbeiði, so sum silkimáling, seyming, brodering, leðurseyming, føroysk bond o. a. Útferð.
Undirvísarar: Jutta Hansen, Gunhild W.Arge, Paulina Eliasen, Elisabeth Akursmørk og Jóhanna á Tjaldrafløtti,
Skeiðið er frá 28. mai til 1. juni. Skeiðið er eitt vistarskeið
Kostnaður fyri skeiðið v/ mati og gisting er 1500,- kr.

***Broyt tínar matvanar, soleiðis at tú kanst liva meiri heilsugott***
Skeiðið er til fólk, ið hava ov høgt blóðtrýst, ov nógv kolesterol í blóðinum, diabetes typu 2, viga ov nógv ella hava áhuga í heilsugóðum mati.

| *Kl.* | *Týsdag* | *Mikudag* | *Hósdag* |
|---|---|---|---|
| 09:30–10.15 | Bólkur A+B | Bókur F+G | Bólkur K+L |
| 10:15–11:00 | Bólkur A+B | Bólkur G | |
| | | | |
| 13.00–13.45 | Bólkur C+D | Bólkur H+I | Bólkur M |
| 13:45–14:30 | Bólkur C | Bólkur I | Bólkur M |
| 19:00–20:30 | Bólkur E | Bólkur J | |

*Bólkur A,B,C,E,G,H,J,M eru byrjunarskeið*
*Bólkur D,F,I og L eru framhaldsskeið*
*Bólkur K her verður ikki vigað*

Skeiðið byrjar 13. mars. Undirvísarar Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu og húsarhaldsfrøðingur og Elisabeth Akursmørk, økonoma.
Kostnaður: 600 kr. fyri byrjunarskeið og 400 kr. fyri framhaldskeið.

Tilmeldað skal verða í seinasta lagi 1 viku áðrenn skeiðið byrjar. Møguleiki er fyri at gista á skúlanum til øll skeiðini.
Til handarbeiðskeiðini er ikki neyðugt at hava seymimaskinu við. Skúlin hevur øll seymiamboð.

Fleiri upplýsingar um skeiðini fáast við at venda sær til skúlan. Viðmerkjast skal at tað er avmarkað luttøka til øll skeiðini.

**Húsarhaldsskúli Føroya**
**Stoksoyrarvegur 29**
**Fo 700 Klaksvík**
**Tlf. 456974**
**e-mail: hsf@post.olivant.fo**

## Umboðsmannaval

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til umboðsmannaval í Fuglafirði 9. mars 2001.

4 umboð skulu veljast.
Uppskot um valevni – minst 6 – mega vera sjúkrakassanum í hendi innan 23. febr. 2001.

Valið fer fram á skrivstovuni.

**Sjúkrakassi Fuglafjarðar Læknadømis**
*25. jan. 2001*

## Avloysari

Søkt verður eftir avloysara fyri bókasavnshjálpara tíðarskeiðið 12. mars til 27. august 2001.

Høvuðsuppgávurnar hjá bókasavnshjálparanum verða í bókabindingini.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Skrivligar umsóknir verða at senda Føroya Landsbókasavni í seinasta lagi 16. februar 2001.

**Føroya Landsbókasavn**
J. C. Svabosgøta 16
Box 61
110 Tórshavn

## Sethús í Vági til sølu

**Matr. Nr. 4ᴮ**
Grundøkið: 232 m²
Húsavídd: 94 m²
Sethús í 2 hæddum.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Suðuroyar Sparikassa, telefon nr.: 373064.

**SUÐUROYAR SPARIKASSI**
Postboks 2 · FR-900 Vágur
Telefon: 373064 · Telefax: 373340

Ford Sierra Cosworth
árgang 1992

Til sølu um hóskandi boð fæst.

Tlf. 223 380, 373 680, 373 660

pf AUTO-VULK
FR-900 Vágur
Tlf. 373680 - 373660
Fax 374680
VULKANISERING OG BILVERKSTAÐUR
Fartelefon 214865



demich

## Ibúð søkist

Fyri eitt av starvsfólkum okkara verður hervið søkt eftir íbúð beinanvegin.

Vinarliga setið tykkum í samband við okkum skjótast gjørligt.

**Demich**
**Tlf. 311071**

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
*Sí SVF tekstvarp s. 650*

www.sosialurin.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2651, **Sp/f Nuna Sten & Grus Føroyar, 530 Fuglafjørður.**

**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri:
Gordon Martin Peturson
Midjord, Bøvegur 24, 530 Fuglafjørður.

Felagið er tann 30.11.2000, farið í likvidatión við Niels W. Poulsen, advokati, Fr. Petersensgøta 9, Box 6, 110 Tórshavn sum likvidator.

Skráseting Føroya tann 29. januar 2001.

Kristin Balle

***Høvuðsreingerð***

*Privat, virkir, fyritøkur, stovnar, skip og bussar*

**Vaskarí & Reingerð**
**tlf. 316300**
**gsm 211312**

**Fái eina høvuðsreingerð nú áðrenn sólin sær!**

**Sig okkum frá**



Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Tíðindablaðið sosialurin

Starv

# Fólkaflutningsleiðari

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Strandfaraskipum Landsins er at hækka tænastu- og góðskustøðið innan fólkaflutningin. Í hesum sambandi verður søkt eftir einum leiðara til fólkaflutningsdeildina (Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir).

Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður kann byrja skjótast gjørligt.

### Uppgávurnar hjá fólkaflutningsdeildini

Fólkaflutningsdeildin skal veita eina úrslitagóða fyrisiting innan fólkaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan fólka- og akfarsflutningin hjá fyritøkuni.

Virksemið á deildini fevnir um hesar høvuðsfunktiónir:
- Planlegging
- Rakstur (skip og bussar)
- Ferðslusamskipan
- Ferðaseðlasamskipan

Fyristandandi uppgávur:

- Uppbyggja góðskustýringarskipanir
- Uppbyggja bíleggingarskipanir á ávísum økjum
- Menna ferðaseðlaskipanina
- Endurskoða prísskipan og príspolitikk
- Langtíðarferðaætlan
- Uppbyggja hagtalsskráir fyri samferðslu
- Fyrireika útbjóðingar av rakstraruppgávum.

### Uppgávurnar hjá leiðaranum

Fólkaflutningsleiðarin skal definera uppgávur, málsetningar og strategiir fyri fólkaflutningstænastuna og skal tryggja, at tær verða settar í verk.

Leiðarin skal tryggja ein effektivan og handilsligan rakstur, og somuleiðis áseta og stýra fíggjarligu karmunum innan tænastuframleiðsluna.

Leiðarin skal harafturat menna flutningsmøguleikar og tryggja optimering av tænastuframleiðsluni við nýtslu av nútímans tøkni.

Tænastuframleiðslan krevur motivatión og luttøku frá starvsfólkunum, og krevur hetta tætt samskifti millum leiðara og starvsfólk.

Aðrar uppgávur hjá leiðaranum:
- Undirvísing og fakliga menning av starvsfólkunum á deildini og úti á rakstrareindunum
- Mánaðarligar frágreiðingar um virksemi og ætlanir
- Fíggjar- og íløguætlan innan fólkaflutningsøkið
- Viðmæla starvssetanir innan fólkaflutningsøkið.

### Førleikakrøv

- Vinnu- og handilsútbúgving frá hægri lærustovni, verkfrøðingur e.l.
- Kunnleiki og royndir viðvíkjandi flutningsskipanum
- Kunnleiki og royndir innan edv á høgum brúkarastøði
- Royndir í projektleiðslu
- Málrættaður og arbeiðir analytiskt
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

### Setanartreytir

Talan er um eitt leiðarastarv við stórum og spennandi avbjóðingum, har leiðarin fær ábyrgdina av at menna eina týdningarmiklað funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært avtalu, og er lønt í 35. lønarflokki sambært tænastumannalógini, tó uttan at starvið er tænastumannastarv. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

### Umsóknir

Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 5. februar 2001. Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Reidar Nónfjall, stjóra.

Tlf. 34 30 00 ella e-postur: ren@ssl.fo.

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

**Bjargingarútgerð til skip og bátar**

- **Neyðrakettir og hondblúss**
- **Bjargingarvestar og kransar**
- **Flótidraktir**
- **Pioneer plastbátar *–nógv model!***

**Vit útvega alt bjargingarútgerð uppá fyrispurning**

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

www.sosialurin.fo

**AMBOÐ**

*Gevind amboð - AC amboð*
*- Tente hjól - Ketusagir*
*- alt til drejibenkur*
*- Trýstspularar - Sveisitól*
*- Luftkompressarar - Taljur*
*- Stroppar - Skjótiseym*
*- Sláimaskinur - Støvsúgvarar*
*- Stigar - Flakaknívar*
*- El-aggregat - Laditól*
*- El- og hondamboð*
*- Luftslangur - Spulislangur*
*- útleiguamboð - Umvæling.*

**Keyp har tú fært mest fyri pengarnar.**
**Góð servica.**
***Keyp frá fakmanninum ...***

**Tórshavnar Maskinhandil**
*v/ Tummas Andreasen*
**Varðagøta 29-30 - Tlf. 313442**

**Grannskoðaravirkið**
**Højmose, FRR**
v/ Børge Christiansen, cand. merc. aud.
Skrásettur grannskoðari
í Heiðum • 370 Miðvágur
Tlf. 333498 • telefax 333490
E-mail: hoejmose@post.olivant.fo
http.//www.rev-hoejmose.dk

## Bogholder/revisor-assistent – deltid

Jeg har brug for en erfaren bogholder til at hjælpe med at bogføre hos en klient i Tórshavn 1-2 timer om ugen. Det kan godt foregå om aftenen. Arbejdet kan eventuelt senere omfatte flere klienter i Tórshavn.